# Prískríggj um svartkjaftin

**Norsk og donsk virkir bjóða himmalhøgan prís fyri svartkjaftin, men Havsbrún vil ikki vera við í kappingini**



*Havsbtún fer ikki at kappast við norðmenn og danir um svartkjaftin, tí teirra prísur er alt ov høgur.*

FISKAPRÍSIR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

– Vit hava ongan áhugav í at taka lut í hasum, tí við hasum prísinum høvdu vit havt hall av at framleiða mjøl, sigur Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún í Fuglafirði.

Síðani svartkjaftafiskiskapurin tók seg upp sunnanfyri, hava skipini fingið sera ymiskan prís, alt eftir hvar tey hava landað. Fyrr í vikuni landaði Finnur Fríði góð 2.500 tons í Noregi og fekk 1,82 norskar krónur fyri kilo frá einum norskum virki. Tað svarar til umleið 1,60 krónur í okkara pengum.

Sama dag keypti eitt danskt virki eina last á norskari uppboðssølu fyri 1,80 norskar krónur fyri kilo, og í gjár seldi Jupiter smá 2.000 tons á norsku uppboðssøluni fyri umleið tað sama.

## Havsbrún ikki við

Øðrvísi prís fáa skipini, sum landa til Havsbrún í Fuglafirði. Tróndur í Gøtu landaði fyrradagin millum 2.700 og 2.800 tons og fekk 1,30 krónur fyri kilo. Sama prís fekk Carlton, sum hevði umleið 1.500 tons.

Bergur Poulsen sigur, at Havsbrún kundi saktans kappast við tey donsku og norsku virkini, men hevði ikki verið serliga skilagott, tí virkir, sum rinda 1,60 krónur fyri svartkjaftin, hava hall av at virka fiskin til mjøl, og tað gevur onga meining.

–Mjølmarknaðurin stendur als ikki mát við handan prísin, so hasum taka vit ikki lut í, sigur stjórin á Havsbrún.

Hann sigur, at tá svartkjaftafiskiskapurin byrjaði í fjør, var eisini stór prískapping, men príslegan javnaði seg rættiliga skjótt. Tað fer aftur at henda í ár, og Havsbrún hevur so mikið av mjøli, at virkið kann loyva sær at bíða eftir tí.

Skotsku og írsku virkini, sum taka ímóti svartkjafti, lata heldur ikki so høgan prís sum tey donsku og norsku.

# Aðrastaðni hevur andstøðan formannin



*Í norska Stórtinginum verður tað hildið náttúrligt, at andstøðan hevur formannin í eftirlitsnevndini.*

**Í grannalondunum eigur andstøðan formannin í nevndini, sum hevur eftirlit við útinnandi valdinum**

POLITIKKUR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Tað elvdi til kjak, tá formansskifti var í landsstýrismálanevndini hjá Løgtinginum í síðstu viku. Kári P. Højgaard segði seg frá, og eftir uppskoti frá honum varð Kjartan Joensen úr Fólkaflokkinum valdur til formann.

Triði nevndarlimnurin, Karsten Hansen, næstformaður frammanundan, og hann hevur sagt, at hann fekk ein fyrispurning frá fráfarandi formanninum um at taka við. Hann játtaði, men tá nevndin hittist til fundar, mælti Kári P. Højgaard til at velja Kjartan Joensen, sum bleiv valdur við atkvøðunum frá fráfarandi formanninum og sær sjálvum.

Millum teirra, sum funnust at formansvalinum, var løgfrøðingurin Bjørn á Heygum, sum var við til at gera uppskotið til stýrisskipanarlóg. Hann vildi vera við, at tað var óheppið, at ein samgongutingmaður er formaður í nevndini, sum skal halda eyga við, at landsstýrismenninir útinna sítt arbeiði til fulnar. Bjørn á Heygum vildi vera við, at formansvalið hevði skert álitið á nevndina.

## Aðrastaðni andstøðan

Løggevandi tingini í flestu grannalondunum hava eisini nevnd, sum skal halda eyga við, at tað útinnandi valdið ger tað, sum er tingsins vilji.

Í Danmark er tað nevndin Statsrevisorerne, sum hevur hesa uppgávuna, men tað sermerkta við hesari nevndini er, at hon kann mannast við fólki, sum ikki eru fólkstingslimir, men sum flokkarnir velja. Í núverandi nevndini eru tríggir limir, sum ikki sita í Fólkatinginum. Av teimum seks nevndarlimunum eru tríggir úr samgonguni og Danska Fólkaflokkinum og tríggir úr andstøðuni, og formaður er Peder Larsen úr andstøðuflokkinum SF.

Christian Mejdahl, fólkatingsformaður, sigur við Sosialin, at eftirlitsnevndini nýtist ikki at skipa seg við einum andstøðumanni sum formanni. Harafturímóti er tað siður, at tann nevndarlimurin, sum hevur tær drúgvastu royndirnar, er formaður.

Í norska Stórtinginum eitur eftirlitsnevndin Kontroll- og konstitusjonskomiteen. Har hava stjórnarflokkarnir fimm limir og andstøðan fýra, men formaður er Lodve Solholm úr andstøðuflokkinum Fremskrittpartiet.

Í svenska Ríkisdegnum heldur Konstitutionsutskottet eyga við, at ráðharrarnir útinna sítt arbeiði til lítar. Eisini her eigur andstøðan formannin. Tað er sosialdemokraturin Bertil Andnor.

Íslendska Altingið hevur onga slíka eftirlitsnevnd, og grønlendska Landstingið hevur bara eina grannskoðaranevnd, sum heldur eyga við fíggjarligu umsitingini hjá landsstýrinum. Eisini her eigur andstøðan formannin, Kristian Jeremiassen úr Atassut.

## Náttúrligt

Felags fyri eftirlitsnevndirnar hjá norðurlendsku tingunum er, at tað er ikki ásett við lóg, at nevndarformaðurin skal umboða ein av andstøðuflokkunum. Tað er meiri ein óskrivað regla, at tað er so.

Hanne Kroll Larsen, sum er skrivari hjá Kontroll- og konstitusjonskomiteen í norska Stórtinginum, sigur, at tað liggur líkasum í luftini, at formaðurin eigur at vera úr andstøðuni.

– Nevndin skal jú hava eftirlit við ráðharrunum, og tí er tað á ein hátt náttúrligt, at andstøðan eigur formannin, sigur hon.

Tí eigur Fremskrittpartiet formannin nú, og undir borgarligu stjórnini hjá Kjell Magne Bondevik var Ågot Valle úr Sosialistiska Vinstraflokkinum, sum tá sat í andstøðu, formaður.